# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-15, 25-20, 25-16)

# Mjølnir vann tryggan sigur

**Mjølnir vann tryggan sigur á Fleyr í meistaradeildini hjá monnum í gjár, og við sigrinum heldur Mjølnir trýstið á oddaliðið, ÍF**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til spennandi dyst í meistaradeildini hjá monnum í gjárkvøldið, tá Mjølnir tók ímóti Fleyr.

Undan dystinum lá Mjølnir á 2. plássi, og teir skuldu helst vinna dystin fyri at halda trýstið á oddaliðið, ÍF. Mótstøðuliðið úr Fleyr lá undan dystinum á fjórða plássið, men megnaðu teir at vinna dystin, so høvdu teir lagt seg undir liðina á Mjølni á 2. plássi.

### Mjølnir legði hart út

Mjølnir og Fleyr hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir fyrr í ár. Fyrri dysturin var allarfyrsti dysturin á árinum, og tann dystin megnaði Fleyr at vinna 3-1. Í seinna dystinum eydnaðist Mjølni at vinna 3-1, so undan hesum dystinum høvdu liðini vunnið hvør sín dyst.

Í triðja dystinum millum feløgini legði heimaliðið úr Mjølni betur fyri. Teir vunnu seg fram um Fleyr at kalla beinanvegin, og sum settið leið øktist munurin á liðunum. Tá settið var komið at enda hevði Mjølnir vunnið fyrsta sett 25-15.

Annað sett minti nógv um tað fyrsta. Hesuferð var Fleyr tó heldur betri við, men aftur í øðrum setti tóktist Mjølnir vera heldur oman á. Teir vunnu seg nøkur stig fram um Fleyr, og úrslitið av 2. setti gjørdist 25-20 til Mjølnir.



*Mjølnir kom væl inn í nýggja árið í meistaradeildini hjá monnum, tá teir vunnu tryggan 3-0 sigur á Fleyr*

### Mjølnir heldur trýstið á ÍF

Í 3. setti var munurin aftur stórur á liðunum, og enn einaferð legði Mjølnir hart út og vann seg nøkur stig fram um gestirnar úr Havnini. Sum settið leið bleiv munurin bara størri ímillum liðini, og at enda hevði Mjølnir eisini vunnið 3. sett 25-16.

Vit frætta úr Klaksvík, at Mjølnir var væl betra liðið. Teir spældu javnt væl allan dystin, og sigurin var fult uppborin.

Við sigrinum heldur Mjølnir trýstið á oddaliðið, ÍF, og munurin á liðunum er nú bara tað eina stigið. Hjá Fleyr sær hinvegin ikki so gott út. Við tapinum hava teir mist kontaktina við tey bæði oddaliðini, og einasti møguleikin hjá teimum tykist vera bronsuheiðursmerkini, sum teir enn hava ein møguleika at røkka.

## Fróði til Silkeborg?

Danska heimasíðan, bold.dk, veit at siga, at føroyski landsliðsleikarin, Fróði Benjaminsen, í næstum skal royndarvenja við danska superligufelagnum, Silkeborg. Fróði hevur einaferð fyrr verið og royndarvant í danska felagnum, og nú vilja teir eftir øllum at døma síggja meir til evnini hjá Fróða á fótbóltsvøllinum. Fróði er ikki einasti leikarin, sum skal til royndarvenjing í Silkeborg. Ein enskur verjuleikari og tríggir áleyparar frá Uganda skulu eisini royna seg í danska felagnum. Fróði Benjaminsen vísir tó sjálvur aftur, at hann skal royndarvenja í Silkeborg.

## Fróði til AB

Fróði Clementsen skrivaði í gjárkvøldið undir eitt ára sáttmála við AB, sum júst er flutt upp í bestu deildina. Hann er fjórði spælarin, sum AB styrkir seg við til komandi kappingarár. Fróði Clementsen er uppvaksin í B36, men seinastu 3 árini hevur hann verið partur av góðu gongdini hjá felagsliðnum úr Sundalagnum. Fróði er sterkur og skjótur verjuleikari, og skal hann styrkja um defensiva partin á AB-liðnum.

SÍ-Fram

# Fram skal hanga í oddinum

**Fram skal royna at hanga í oddaliðunum í meistaradeildini hjá monnum, tá teir vitja hjá SÍ í Sørvági**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Flogbóltskappingin hevur ligið still síðani undan jólum, men nú fara liðini aftur í gongd, og nú vera týdningarmiklu dystirnir í endaspælinum á skránni.

Fram er eitt av teimum liðunum, sum nógv var væntað av undan kappingini. Teir hava eisini fingið hampiliga góð úrslit og liggja í løtuni á einum 3. plássi í bestu deildini aftanfyri ÍF og Mjølnir.

Hjá SÍ hevur ikki gingið so væl. Teir hava bara vunnið ein dyst í ár og liggja í løtuni aftast í deildini. Teir hava tó verið nær við í fleiri umførum, men higartil er tað so bert blivið til tann eina sigurin.

SÍ og Fram hava leikt tveir dystir fyrr í ár, sum báðir vóru í grundspælinum. Teir dystirnar vann Fram báðar, men serliga seinni dysturin var sera spennandi, og her kundu bæði liðini í roynd og veru vunnið.

Um Fram ætlar sær at hanga í hinum báðum oddaliðunum, so er týdningarmikið hjá teimum at vinna dystin á botnliðnum. Teir eru longu fimm stig aftan fyri ÍF, so um teir ætla sær meistaraheitið, so hava teir ikki ráð at tapa fleiri stig. Hjá SÍ ræður eisini um at vinna, um teir ætla sær heiðursmerkið í ár.

Dysutrin verður á skránni í kvøld, hóskvøld, kl. 19.45 í Sørvági.